Álit

í

løgtingsmáli nr. 45/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattlig javnseting av persónum við framskundaðari pensjón og fyritíðarpensjónistum)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 4. november 2020 og eftir 1. viðgerð 17. november 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 24. november 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Nevndin vísir á, at við uppskotinum verður ásetingarlógin dagførd, og kann dagføringin býtast í tríggjar partar:

-Skattliga verða persónar, sum fáa framskundaða pensjón, javnsettir við fyritíðarpensiónistar

-Ásetingin verður avmarkað til persónar, sum eru undir 67 ár

-Tilvísingin til forsorgarlógina, sum fer úr gildi 1. januar 2021, verður strikað.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 30. november 2020

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Kristina Háfoss
	Ruth Vang	